# Barnafagnaðurin væl fagnaður

**Leygardagin 21. mai skipaðu allir barnagarðarnir í Eysturoy fyri stórum barnafagnaði í Ítróttarhøllini í Runavík. Umleið 400 børn luttóku í tiltakinum**

BARNATILTAK
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Tórheðin Jensen*



Leygarmorgunin kl. 10 setti Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, Barnafagnaðin í Ítróttarhøllini í Runavík.

Umleið 400 børn luttóku í tiltakinum umframt foreldur, systkin, ommur og abbar, so talan var um eitt rættuliga stórt tiltak.

Børnini á teimum ymisku stovnunum høvdu fyrireika seg væl til hendan dagin, og hvør stovnur hevði sín bás, sum børnini pyntaðu við lutum, ið tey sjálvi høvdu gjørt. Eisini framførdu tey ymiskar leikir í samband við tiltakið.

Foreldraráðini stóðu fyri sølu av kaffi, køkum, pylsum og sandwish.

Familjurnar hugnaðu sær óført, har var undirhald á skránni og t.d. sang Karl Martin Samuelsen úr Klaksvík saman við børnunum.

Stovnarnir sum skipaðu fyri fagnaðinum vóru: Barnagarðurin á Mýrunum, Runavík, Útibarnagarðurin Víkin, Æðuvík, Barnagarðurin á Svangaskarði, Dagstovnurin- á Oyri, Dagstovnurin- í Gøtu, Dagstovnurin- í Fuglafirði, og Dagstovnurin á Gásamýri, Leirvík.



*Vøggustovubørn úr Gøtu spæla »ljóti dunnungin«*



*Tornurósa og ein prinsur*



*Gentur gera prýði*









*Umleið 400 børn luttóku í tiltakinum umframt foreldur, systkin, ommur og abbar, so talan var um eitt rættuliga stórt tiltak*

**Dagurin**

**25. mai. Urbanus.** Hann var Pávi, til hann varð hálshøgdur ár 230. Eftir teimum gomlu álmannakkunum var Urbanus fyrsti summardagur. Navnið merkir upprunaliga býarbúgvi.